Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 7. apríl 2006



**Slóðarar 4:6 - Sanna Dahl Niclasen**
Hóast ein fjórðingsøld er liðin, síðani Sanna Dahl Niclasen legði frá sær sum yvirlækni og leiðari á røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum, minnast mong hana framvegis við takksemi og virðing fyri læknaligu avrik hennara tey 25 árini, hon var í starvi á høvuðssjúkrahúsi okkara. Í sendingini fáa vit alla lívssøguna hjá hesi sjáldsomu og áhugaverdu kvinnu, sum varð borin í heim í Vági 3. juli 1915. Leivur Hansen legði til rættis.

**Pálmasunnudag 9. kl. 20.00**



**Norðurstovubussurin**
Bilsmíð er ikki heilt ókent í Føroyum. Tað er Norðurstovubussurin eitt dømi um. Jens Jákup Hansen, sum hevur gjørt sendingina um bussin, sigur, at teir gjørdu bussar burturúr gomlum lastbilum og eisini úr ambulansum, sum bretski herurin hevði undir Seinna Kríggj. Men Norðurstovubussurin varð bygdur frá grundini og arbeiðið varð gjørt í smiðjuni hjá J. K. Joensen í Miðvági. Vit skulu hoyra og síggja, hvussu tað varð gjørt. Lagt til rættis hevur Jens Jákup Hansen.

**Skírishósdag 13. kl. 20.00**

**Sex & the City 5**
Carrie er øvundsjúk. Hon er øvundsjúk tí ein kvinnuligur kenningur ger sær dælt av sínari kynsligu atdráttarmegi. Og seinni kemur hon sjálv í eina tvístøðu. Hon kemur í hóslag við ein franskan arkitekt, sum tað vísir seg, heldur hana vera skøkju.

**Mánadag 10. kl. 21.50**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**